## Fara nú aftur at rudda kava

**Blokadan, sum Føroya Arbeiðarafelag lýsti ímóti kavaruddingini hjá Landsverkfrøðinginum, eru nú av**

SÁTTMÁLATRÆTA
*Áki Bertholdsen*

Blokadan, sum Føroya Arbeiðarafelag fyri nøkrum døgum síðani setti í verk ímóti kavaruddingini hjá Landsverkfrøðinginum, er nú av.

Tað varð gritt eftir at Føroya Arbeiðarafelag hósdagin hevði havt fund við álitismenninar hjá teimum, sum rudda kava.

Føroya Arbeiðarafelag tók annars tað stig fyri nøkrum døgum síðani at nokta limum sínum at rudda kava av landsvegunum, tí ósemja hevði tikið seg upp ímillum felagið og Landsverkfrøingin um, hvussu sáttmálin skuldi tulkast á ymsum økjum.

Tað var serliga viðvíkjandi tilkallivaktum, at ósemja tók seg upp. Føroya Arbeiðarafelag helt ikki, at Landsverkfrøðinguin helt sínar skyldur á hesum øki og vildi ikki geva teimum, sum rudda kava, tær sømdir, sum eru avtalaðar í sáttmálanum.

Hetta hevði komið sera illa við, um tað fór at kava, tí so hevði øll samferðsla á landi verið løgd lamin.

Sáttmálin á økinum er ímillum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og tí kom Arbeiðsgevarafelagið upp í málið. Samráðingar millum tað, og Føroya Arbeiðarafelag, førdi til, at arbeiðsgevaranir løgdu eitt uppskot fyri Føroya Arbeiðarafelag um, hvussu trupulleikin kundi loysast.

Og hesum uppskoti Tók Føroya Arbeiðarafelag av, eftir fund við áltismenninar.

Ingeborg Vinther sigur, at tey hava fingið eina loysn, sum tey kunnu liva við, til samráðingar verða aftur. Tí hava tey gjørt av at taka kavaruddingina uppaftur og samstundis varð blokadan avlýst.

# Nýggjur grindaknívur ótrúliga lættur at brúka

**Við nýggja grindaknívinum, sum Kristian Glerfoss í Mikladali hevur gjørt, verður hvalurin at kalla svavdur ístaðin fyri at verða skorin á háls, sum vit hava gjørt í øldir**

GRINDADRÁP
*Áki Bertholdsen*

Hesi seinastu árini hava føroyingar gjørt sær stóran ómak fyri at bøta um grindadrápið.

Eitt stig á leiðini var at menna tann nýggja grindakrókin, ið verður settur í blástrið á hvalinum, ístaðin fyri at verða høgdur í hann.

Nú er aftur eitt nýtt uppfinnilsi gjørt, sum grindamenn seta stórar vónir til.

Tað er Kristian Glerfoss á Mikladali, sum hevur uppfunnið eitt nýtt slag av grindaknívi.

Við tí nýggja knívinum, verður hvalurin stungin ístaðin fyri at verða skorin, soleiðis, sum vit altið hava gjørt

Hesin nýggi knívurin verður á fyrsta sinni sýndur alment fram í sambandi við grindafundirnir sum eru kring landið í hesum døgum.

Hóskvøldið var grindafundur í Vági fyri grindamenn úr Suðuroy

Á tí fundinum greiddu Maria Dam frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni frá um ymsar kanningar av umhvørviseituri í grind og Dorethe Bloch Danielsen frá Náttúrugripasavninum, greiddi frá grindini, sum varð merkt við sendara í Vágum í fjørð.

Við á fundinum var eisini djóralæknin Jústines Olsen, sum hevur verið undangongumaður í royndunum at bøta um grindadrápið.

Og við sær á fundin, hevði hann eisini hendan nýggja Mikladalsknívin, sum Kristian Glerfoss hevur ment.

Tað kollveltandi við hesum nýggja knívinum, er, at við honum verður hvalurin stungin ístaðin fyri skorin, sum vir altíð hava gjørt.

Við øðrum orðum kann sigast, at hvalurin verður at kalla svavdur ístaðin fyri at verða skorin á háls.

Tað skiltist á djóralæknanum, at hann setti stórar vónir til hendan nýggja knívin.

Sjálvur hevði hann roynt hann í trimum drápum og hann hevði eisini latið aðrar grindamenn roynt hann.



*Her er tað formaðurin í Grindamannafelagnum, Ólavur Sjúrðarberg úr Leirvík, sum vísir knívin fram, so at hann rættiliga sæst. Eisini hann er sera spentur uppá, hvussu hann fer at rigga*

Nýggi knívurin er góðar 30 sentimetrar langur og verður hann brúktur rætt, verður lívið tikið av hvalinum uppá eitt sekund, ella tvey, tað er ikki øðrvísi enn at svevja ein seyð, sigur hann.

Hesin nýggi knívurin er eisini ótrúliga lættur at fáast við. Hann fortaldi fyri grindamonnunum í Suðuroy, at tá íð knívurin var komin eitt sindur inn, fossar blóðið upp úr, men tað vísti bara, at grindamaðurin var á rættari leið og hevði skotið æðrararnar, til heilan, av.

– Tá ið knívurin so er komin niður á mønuna, ger hvalurin bara ein lítlan brest- og so er hann deyður.

Hesin nýggi knívurin er eisini lættur at gera.

– Tað er í nógvum førum bara at saga skaftið av hvalvákninum, so hevur tú knívin, segði djóralæknin.

### Ikki góðkendur

Jústines legði dent á, at hesin nýggi knívurin er ikki góðkendur grindareiðskapur enn.

Men tað verður arbeitt við at fáa hann góðkendan, men tað er ein long tilgongd, at fáa hann góðkendan, tí tað eru so fáar grindir.

Nú skulu fyrst onkrar smávegis ábøtur gerast á knívin. Síðani er ætlanin at royna hann nakað oftari. Eydnast allar roYndir so væl, sum vónað, er eisini ætlanin at gera eitt sjónband, sum vísir, hvussu knívurin skal brúkast.

Ikki fyrrenn tá, verður hesin nýggi knívurin góðkendur grindareiðskapur, sigur Jústines Olsen.



*Jústines Olsen, Djóralækni vísir setir stórar vónir til tann nýggja grindaknívin, sum hann vísti grindamonnum í Suðuroy á fundi hóskvøldið. Royndir higartil vísa, at tað tekur at púra onga tíð at fáa lívið av einum hvali við hesum nýggja knívinum, tað snýr seg um eitt sekund, ella tvey.*



# Nú tosa deyv í fartelefon

**Við at senda SMS, tað eru stutt skrivlig boð gjøgnum fartelefon, hava tey deyvu fingið eitt nýtt og ómetaliga hent samskiftisamboð. Tey kunnu nú vera meira sjálvstøðug og hava nógv størri møguleikar at samskifta enn áður**

SAMSKIFTI
*Stefan í Skorini*



*Maria Ellefsen, formaður í Deyvafelagnum, sigur, at eftir at hon fekk fartelefon, sum kann senda skrivlig boð, hevur hon fingið størri persónligt frælsi. Tey deyvu eru sum heild sera fegin um henda nýggja samskiftisháttin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað eru ikki bara ungir skúlanæmingar, sum veruliga hava tikið SMS-boðini til sín. Eisini tey deyvu hava varnast henda nýggja samskiftishátt og brúka hann nógv.

Maria Ellefsen er deyv og er eisini formaður í Deyvafelagnum. Hon hevur havt fartelefon í næstan eitt ár, og hon sigur, at síðan hon fekk henda møguleikan, er hennara persónliga frælsi økt nógv.

– Eg kann nú í størri mun velja sjálv, hvønn eg seti meg í samband við, og hvønn eg vil samskifta við. Sum deyvur hevur tú ikki altíð so stóra ávirkan á slík viðurskifti. Eg kenni meg ikki so bundna at øðrum longur, sigur Maria.

Fyrr var tað ofta so, at onkur mátti ringja fyri Mariu, tá hon skuldi seta seg í samband við onkran vin ella arbeiðsfelaga. Hesum ræður hon meira sjálv yvir nú enn áður.

– Ofta var eg noydd at brúka foreldrini sum millumlið, tá eg skuldi lata boð frá mær, og tað er ein stórur lætti at sleppa frá hesum. Nú sendi eg boðini beinleiðis til viðkomandi við telefonini. Soleiðis kann eg hava mítt privatlív privat, leggur Maria læandi afturat.

### Gongur skjótari fyri seg

Munurin er eisini hann, at tað gongur skjótari at fáa samband við vinirnar við at senda eitt skrivligt boð.

– Um okkurt hendir brádliga, so kann eg skjótari lata boð frá mær ella fáa boð frá onkrum øðrum. Nakað so einfalt sum at biðja um ein hýruvogn var heldur torførari fyrr, men nú gongur tað skjótari og lættari, tí eg kann senda boð eftir einum hýruvogni við fartelefonini, sigur Maria.

Hesin nýggi samskiftishátturin hevur eisini tað við sær, at tey deyvu kunnu hava samband við nógv fleiri fólk, og tí er tað lættari at fáa nýggjar vinir, sum ofta er torførari hjá deyvum.

Maria heldur tað ver a serliga stuttligt at hava samband við vinir, sum eru staddir langt burturi.

### Hent hjálpitól

Ein fartelefon er eitt hjálpitól hjá deyvum, eins og ein koyristólur er tað hjá einum lamnum. Og teir flestu limirnir í Deyvafelagnum hava eisini fartelefon. Maria sigur, at av teimum tredivu limunum í felagnum kunnu teir teljast á einari hond, sum ikki hava fartelefon. Hetta vísir undirtøkuna, heldur Maria.

Sum formaður í Deyvafelagnum hevur Maria brúk fyri at kunna senda boð til allar limirnar, og at boðini koma fram nakað skjótt.

Maria arbeiðir eisini sum lærari á Kvøldskúlanum. Hon skal tí allatíðina kunna samskifta við næmingarnar hjá sær.

– Í mínum arbeiði bæði sum lærari og formaður hevur tað verið ógvuliga hent at hava eina fartelefon. Um eg skal siga okkurt við limirnar ella næmingarnar, so kann eg skjótt fáa boðini runt til øll, sigur Maria.

### Deyv samband við hoyrandi

Tað kann ofta vera torført hjá deyvum at fáa samband við hoyrandi, sum ikki duga teknmál.

– Við fartelefonini hava vit deyvu størri møguleika at seta okkum í samband við hoyrandi fólk, sum vit annars ikki kundu áðrenn, sigur Maria.

Maria leggur afturat, at telefonrokningin verður kanska nakað høg, tá hon sendir so nógv boð, men tá tey deyvu als ikki brúka telefonina at tosa við, so javnar tað seg nakað.

Tað vísir seg ofta, at tey eldru hava torført við at venja seg við nakað nýtt, men á Deyvahúsinum siga tey, at hesi at byrja við ikki vildu vita av fartelefonunum, men nú sita tey eisini og skriva við henni.

Maria heldur, at fartelefonin nú verður meira brúkt enn at senda teldupost, sum eisini var eitt stórt frambrot, tá tað kom fram.

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| **TOYOTA CAMRY 2,0 GII** Skrás.: 02.04.98 Km.: 44.000 Prísur: 189.600,- Garanti** | **TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B** Skrás.: 16-10-97 Km.: 57.000 Prísur: 98.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK** Skrás.: 28-06-96 Km.: 78.000 Prísur: 165.600,- Garanti* | **TOYOTA COROLLA 1,3 AUT.GEAR** Skrás.: 22-06-88 Km.: 116.000 Prísur: 29.600,- Sýnaður 11-00 |
| **TOYOTA CAMRY 2,0 GII** Skrás.: 10-07-91 Km.: 129.000 Prísur: 69.600,- Sýnaður 10-00 | **VOLVO 460 SEDAN** Skrás.: 25-05-90 Km.: 92.000 Prísur: 48.600,- Sýnaður 06-99 |
| **TOYOTA AVENSIS 2,0 SOL** Skrás.: 23-06-99 Km.: 22.000 Prísur: 166.000,- Garanti** | **PEUGEOT 405 1,9 T-DIESEL** Skrás.: 10-01-96 Km.: 80.000 Prísur: 128.600,- Garanti* Sýnaður 09-00 |
| **TOYOTA CARINA E 2,0 GLI SEDAN** Skrás.: 24-08-95 Km.: 112.000 Prísur: 110.600,- Garanti* | **OPEL ASTRA 1,6 I STW.** Skrás.: 03-11-97 Km.: 35.000 Prísur: 110.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA E 1,6 CDX** Skrás.: 18-10-96 Km.: 77.000 Prísur: 103.600,- Garanti* | **MAZDA 323 1,5 LX** Skrás.: 30-09-97 Km.: 99.000 Prísur: 80.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN** Skrás.: 30-05-94 Km.: 109.000 Prísur: 89.600,- Garanti* Sýnaður 03-00 | **HYUANDAI ACCENT 1,5** Skrás.: 02-01-98 Km.: 25.000 Prísur: 79.600,- Garanti* |
| **TOYOTA CARINA 2,0 GII** Skrás.: 08-03-89 Km.: 250.000 Prísur: 36.600,- Garanti* | **RENAULT MEGANE 1,6 3 HURÐAR** Skrás.: 22-05-96 Km.: 100.000 Prísur: 65.600,- Garanti* Sýnaður 09-00 |
| **TOYOTA CARINA 1,6 XL** Skrás.: 21-06-89 Km.: 169.000 Prísur: 39.600,- | **FORD ESCORT 1,8 T-DIESEL** Skrás.: 20-03-98 Km.: 57.000 Prísur: 110.600,- Garanti* |
| **TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL** Skrás.: 28-10-93 Km.:140.000 Prísur: 83.600,- Garanti* | **FORD ESCORT 1,6** Skrás.: 22-09-95 Km.: 87.000 Prísur: 74.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B** Skrás.: 11-08-98 Km.: 17.000 Prísur: 132.600,- Garanti** | **FORD ESCORT 1,8 SPORT** Skrás.: 01-08-95 Km.: 43.000 Prísur: 74.600,- Sýnaður 12-00 |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B** Skrás.: 30-09-98 Km.: 52.000 Prísur: 115.600,- Garanti** | **FORD FIESTA 1,8 DIESEL** Skrás.: 19-01-96 Km.: 97.000 Prísur: 63.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6** Skrás.: 19-11-98 Km.: 15.000 Prísur:124.600,- Garanti** | **CITROEN BX DIESEL** Skrás.: 01-11-88 Prísur: 29.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B** Skrás.: 20-04-99 Km.: 7.000 Prísur:114.600,- Garanti** | **FORD ESCORT 1,8 DIESEL** Skrás.: 16-08-91 Km.: 134.000 Prísur: 42.600,- Sýnaður 01-01 |

Sosialurin - 311820

VØRUVOGNAR

**MAZDA B-2500 PICK-UP DIESEL** Skrás.: 11-05-00
Km.: 9.000 Prísur: 128.600,- Garanti*

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚ KTBILAVÁTTAN.
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

REYNI SERVICE




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040